

Karl Eirik Schjøtt-Pedersen

# Fyrrverandi fiskimálaráðharri á odda fyri norsku oljuvinnuni

**Jógvan Hugo Gardar**

15.05.2015 - 06:49

Oljan.fo

Karl Eirik Schjøtt-Pedersen er byrjaður sum stjóri fyri Norsk olje og gass, systurfelagsskapurin hjá Føroya Oljuídnaðarbólki (Foíb). Schjøtt-Pedersen er ein kendur persónur í norskum politikki farnu góðu 20 árini sum stórtingslimur og ráðharri fyri norska javnaðarflokkin. Hann hevur millum annað verið fíggjarmálaráðharri og fiskimálaráðharri.

Schjøtt-Pedersen kemur upprunaliga úr Finnmark í Norður-Noregi, og er kendur fyri at hava týðuligar meiningar, og tað kemur hann helst eisini at hava í nýggja starvinum.

- Olju- og gassídnaðurin er tann parturin av vinnulívinum sum hevur størst týdning. Vinnan stendur fyri 20 prosentum av øllum virðunum sum verða skapt í Noregi, og hendan vinnan

tryggjar landskassanum 25 prosent av inntøkunum. Eg eri tí skelkaður av einum orðaskifti um hesa vinnuna sum byggir á so nógvar misskiljingar. Gass úr Noregi kemur at tryggja at Evropa kann minka um síni útlát av klimagassi, sigur Schjøtt-Pedersen í samrøðu við heimasíðuna hjá Norsk Olje Og Gass.

Hann sigur at hóast oljuprísurin í løtuni er lágur, so kemur oljuvinnan at hava stóran týdning framyvir, og prísurin kemur at fara uppaftur.

- Vit koma at síggja íløgur í norðara parti av Noregi fyri minst 100 milliardir krónur komandi fimm árini, sigur Schjøtt-Pedersen.

Fleiri enn 300.000 norðmenn eru knýttir til oljuvinnuna, og Schjøtt-Pedersen sigur at hann ynskir at vera við til at tryggja at hendan vinnan kemur at hava líka stóran týdning fyri Noreg komandi 50 árini, sum hon hevur havt farnu tíggjuárini.